


Lassin Isaksen, 50 ár
*Dómaraleiðari, húsavørður*
*og ábyrgdari í Norðoya Sparikassa*

NORÐOYA SPARIKASSI

ÁBYRGDARAVALID 2011

# Ábyrgdaravalid verður 7. - 18. mars

Ert tú ábyrgdari og myndugur, hevur tú valrætt til umboðsráðið í Norðoya Sparikassa. Umboðsráðið er hægsti myndugleiki sparikassans.

Tú kanst gerast ábyrgdari við at gjalda kr. 1.000 í ábyrgdarpeningi. Hvør ábyrgdari kann tó í mesta lagi eiga kr. 20.000 í ábyrgdarpeningi. Valrætt hesuferð hava einans ábyrgdarar, ið teknaðir vóru áðrenn 5. februar 2011 - sama er galdandi fyri hækking av áyrgdarafæi.

Valt verður á øllum deildum sparikassans frá mánadegi 7. til og við fríggjadagin 18. mars 2011. Atkvøtt verður í avgreiðslutíð sparikassans. Seinasta dagin, tann 18. mars, ber tó til at velja í høvuðsdeild sparikassans í Klaksvík fram til kl. 19.00.

Sum nakað nýtt ber eisini til at atkvøða við brævatkvøðu. Ábyrgdarar, ið ynskja at nýta hendan møguleikan, kunnu venda sær til valnevndina.

## Veljast skulu 39 umboð:

22 fyri Klaksvík, Norðoyri, Ánirnar, Árnafjørður og útlond
9 fyri Leirvík og Føroyar annars
6 fyri økið eystan Múla
2 fyri Kalsoy og Kunoy

## Hvør kann gerast valevni?

Persónliga myndugir ábyrgdarar kunnu stilla upp til valið. **Uppskot um valevni skulu skrivliga vera sparikassanum í hendi í seinasta lagi sunnudagin 13. februar 2011.**

Er okkurt tú ivast í ella vilt vita meiri um, ert tú vælkomin at seta okkum spurningar hesum viðvíkjandi.

Viðtøkur og valreglur sparikassans eru tøkar á deildum og heimasíðu okkara.

## Ábyrgdaravalid 2011

NORÐOYA SPARIKASSI

*Ósávegur 1*
*Postboks 149*
*FO-710 Klaksvík*
*Tel. 47 5000*
*Fax 47 6000*
*ns@ns.fo*
*www.ns.fo*